# ítróttur

Nr. 187 • fríggjadagur • 28. september 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

**Úrslitið í býarsúkklingini**

1. Gunnar Dahl Olsen.
2. Eli Christiansen.
3. Sverri Mohr Edvinson
4. Esmar Joensen.
5. Beinir Rasmussen.
6. Jens Sigurd Simonsen.
7. Dánjal Michaelsen.

**FM-unglingar**

1. Eli Christiansen
2. Dánjal Michaelsen

**FM-menn:**

1. Gunnar Dahl Olsen
2. Sverri Mohr Edvinson
3. Esmar Joensen

## Gunnar vann býarkappingina

**Gunnar Dahl-Olsen gjørdist vinnari av fyrstu FM-kappingini í býarsúkkling, sum var í Havn mikukvøldið**

SÚKKLING

Mikukvøldið skipaði Tórshavnar Súkklufelag fyri fyrstu ferð fyri FM í býarsúkkling. Kappingin var á Hálsi í Havn. Á einari 600 metrar langari rundleið varð súkklað í 40 minuttir, so bleiv ringt við einari klokku og farið var út á seinasta rundteinin.

Ikki óvæntað vann Gunnar Dahl-Olsen, sjálvt um hann hevur ligið í dvala á Tenerifa síðani fyrst í September. Honum á baki kom nýggja stjørnuskotið í føroyskari súkkling, 16 ára gamli Eli Christiansen.

Hesir báðir, saman við Esmari Joensen og Sverra Mohr Edvinsyni, løgdu seg skjótt á odda, og Beinir Rasmussen, Jens Sigurd Simonsen og 14 ára gamli Dánjal Michaelsen dragnaðu frá. Einaferð sá út sum Sverri fór sama vegin, men hann menti seg aftur, og sjálvt um Gunnar og Eli súkkladu skjótt og royndu allar snildir fyri at sleppa frá hinum báðum, so fylgdust teir so at siga um málstrikuna.



*Gunnar Dahl-Olsen*

Eina lítla løtu, tá umleið hálvur teinurin var súkkladur, sást at Eli var móður, men Eli er ikki hann ið gevst tá á stendur. Hann fetti seg á, legði seg á odda og bjóðaði av, meðan hinir kundu hvíla seg í le av honum eina løtu.

**30 km**

Fríggjakvøldið verður 30 km tíðar FM-súkkling úr Havnini til Kaldbaks og aftur. Tilmeldingin til hesa kappingina er heldur størri enn til býarsúkklingina.

Sunnudagin kl 1300 fara so somu menn ar kappast á 100 km teinunum. FM-100 km verður hesaferð tvær ferðir: Úr Havnini, til Kollafjarðar, um Oyggjarvegin og aftur til Havnar, har seinastu 20 km verða súkklaðir á einari rundleið, ið er 5 km long, og er frá Skógrøkt Landsins, eftir Hvítanesvegnum, Ringvegnum, niðan eftir Sundsvegnum, eftir Vegnum Langa - Ringvegnum og aftur til Skógrøkt Landsins.

Balslev er høvuðsstuðul til kappingina, teir lata tí bæði heiðursmerkir og steyp til vinnararnar! Blómuhandilin Ártíðirnar stuðla eisini við vøkrum blómum til vinnararnar.

## Framvegis knotur í gomlum kongum



*NSÍ. Gullvinnarar í 5. deild 2001. Aftanfyri frá vinstru: Sverri Justinussen, Elnar Rasmussen, Eyðun Gaardbo, Eyðun Petersen, Tórbjørn Jacobsen, Andrass Olsen, Mattias Davidsen, Poul J. Poulsen, Sveinur í Heiðunum, Gestur á Líknargøtu, Ragnar Olsen, Símun Danielsen og Tryggvi Mortensen. Frammanfyri frá vinstru: Jóan Petur Langgaard, Búgvi Jacobsen, Sigmund Johannesen, venjari, Dániel Pauli Jensen, Ba Kundsen, Arnbjørn Nielsen, Ólavur Gunnarsson og Oddfríður Gaardbo*



*Sigmund Johannesen, venajari, og Tórbjørn Jacobsen, sum í fjør var kosin næstbesti spælarin. Í ár talaði hann longri undir borðhaldinum, enn hann spældi á vøllinum, verður sagt úr Runavík!*

**Í B68 og NSÍ ganga royndu spælararnir við lív og sál upp í fótbóltin, og gullkrónurnar koma væl við – eisini í 4. og 5. deild**

Tá tað ræður um fótbólt, er nógv broytt í Eysturoy seinastu fjórðings øldina. Nú er einki at ivast í, at fótbóltsáhugin er onganstaðni í landinum størri, enn hann er í Eysturoy. Tað sást eitt nú aftur í, at fýra feløg í oynni eru umboðað í bestu deildini – EB/Streymur, NSÍ, B68 og GÍ.

Undan síðsta umfarinum, sum er á skránni í morgin, er tað greitt, at øll hesi feløgini eisini komandi ár fara at verða umboðað í 1. deild. Og tað er eisini møguleiki fyri, at eitt felag afturat verður í fremstu røð. Skálamenn bíða spentir til tað seinnapartin í morgin verður greitt, hvørjum teir tey bæði næstu vikuskiftini skulu telvast ímóti um eitt pláss í 1. deild. Frammanundan er greitt, at tað verður ímóti B71 ella FS Vágum.

Tá tað verður sagt, at tað er nógv broytt seinastu fjórðings øldina, so er hetta tí, at fyri einari fjórðingsøld síðani var bara eitt felag í Eysturoy í bestu deildini. Tað var ÍF. Júst fyri 25 árum síðani – í 1976 – royndi NSÍ seeg fyrstu ferð í 1. deild, og síðani tá er ikki helmað í. GÍ kom í 1. deild í 1980, B68 kom í 1981, og LÍF hevur eisini fleiri ferðir roynt seg.

**Toftamenn duga enn**

B68 vann FM í 1984, 985 og 1992. Summir spælarar vóru við til at vinna øll meistaraheitini, meðan onkrir, sum vóru við tey fyrru árini, vóru ígjvir í 1992.

Men nú spæla nógvir av hesum á sama liði. Tað er í 4. deild, og tað liggur væl fyri hjá teimum. Næstsíðsta leygardag vóru teir á Eiði og spældu finalu ímóti HB. B68 vann 3–1, men teir flyta ikki upp í 3. deild, tí har hevur B68 frammanundan eitt lið. Málskjúttar á Eiði vóru Aksel Højgaard, Fróði Davidsen og Ingolf Petersen.

**NSÍ fimm ferðir á rað**

Í Runavík verður nógv gjørt burtur úr 5. deildarliðnum, sum næstsíðsta leygardagin ognaði sær fimta meistaraskapin á rað. Ábyrgdarmaður fyri liðnum er Sigmund Johannesen. Hann hevur verið venjari síðstu fimm árini, og hann ætlar at halda fram eitt ár afturat:

– So fara vit kanska at vinna seinna steypið til ognar, heldur hann vónríkur fyri.

Næstsíðsta leygardag tapti NSÍ 6–3 á heimavølli ímóti EB/Streymi.

– Vit taptu eisini 6–3 ímóti teimum á Mølini. Á Toftum var javnt, 1–1 ímóti B68. Annars hava vit vunnið allar hinar dystirnar, sigur Sigmund Johannesen, sum avgjørt ikki hevur truplulleikar at manna liðið.

– Tað er so stórur áhugi fyri at sleppa at spæla við, at teir ringja til mín og spyrja, nær næsti dysturin verður. Vit venja hvørt mikukvøld, og tað hevur verið ógvuliga hugaligt, sigur Sigmund Johannesen, sum eisini gleðist um, at tað eydnaðist at vinna deildina, sjálvt um teir í 2. deild komu at leita eftir fólki á hansara liði.

Í Runavík hevur tað verið skemtað óført við, at Tórbjørn Jacobsen hevur verið á liðnum. Í síðsta dystinum slapp hann inn síðstu minuttirnar.

– Tá høvdu vit tapt alíkavæl, helt venjarin!

Eftir síðsta dystin var borðhald í Elduvík. Teir søgdu, at Tórbjørn Jacobsen fekk longri talutíð í Elduvík, enn hann fekk spælitíð á liðnum í ár!

Ítróttarsosialurin ynskir bæði B68 og NSÍ tillukku við góðu úrslitunum.



## B93 í tungum sjógvi

*Ógreitt er, hvussu støðan hjá Øssuri Hansen er, nú felag hansara kennur seg noytt at selja spælarar*



**Felagið hjá Øssuri Hansen er so mikið illa fyri, at teir kenna seg noyddar at selja fleiri spælarar**

Tað ljóðar ikki frá nøkrum serligum í B93. Felagið, sum Øssur Hansen hevur umboðað síðani summarsteðgin, er í rættuliga tungum fíggjarligum sjógvi. Trongstøðan er so mikið stór, at felagið ikki sær aðrar útvegir burturúr, enn at royna at selja spælarar.

– Skulu vit megna skyldurnar, sum vit hava, so verður neyðugt at minka um útreiðslurnar. Tað kunnu vit gera við at selja onkrar spælarar, og sjálvandi er størst møguleiki fyri at finna áhugaðar keyparar, um talan er um bestu spælararnar hjá okkum, siga teir í B93 leiðsluni. Í gjár var ikki greitt, hvørjar spælarar talan fór at vera um.

Um B93 fer at fáa søluprís fyri spælararnar, samstundis sum teir sleppa undan størstu lønarútreiðslunum, so rokna teir við at standa seg betur fíggjarliga, enn teir hava gjørt ta seinastu tíðina.

Einki hevur enn verið at hoyrt um, hvussu tað verður við Øssuri Hansen. Fyrr í summar varð ein leiguavtala gjørd millum Tofta Ítróttarfelag og B93. Avtalan fevndi um restina av hesum árinum. Tí ber tað neyvan til hjá B93 – um teir høvdu havt áhuga fyri tí – at selja Øssur til eitt annað felag, uttan at toftamenn vóru við í handlinum.

At B68 og B93 gjørdu eina leiguavtalu skuldi bera við sær, at um ella tá Øssur kom aftur til Føroya, so skal hann umboða B68.

**jh**



*Gullvinnarar í 4. deild 2001. Aftanfyri frá vinstru: Atli Joensen, Eyðfinn Olsen, Olaf Magnussen, Arnfinn Olsen, Jógvan Martin Olsen, Dávur Hansen, Edmund Jacobsen, Ingemar Højgaard, Jóhannus Danielsen og Petur Hans Hansen. Frammanfyri frá vinstru: Aksel Højgaard, Fróði Davidsen, Ingolf Petersen, Alberg Gaardlykke, Høgni Hansen, Símun Johannesen, Petur Gaardlykke og Heri Jacobsen*

## Royn og KÍ nú leygardagin

**Tveir klaksvíkingar eru leikbannaðir, tá teir fara til Suðuroyar at verja plássið í næstbestu deildini**

Kappingarnevndin hevur nú gjørt av, at tann fyrri dysturin ímillum Royn og KÍ skal spælast í Hvalba nú leygardagin, og at tann seinni dysturin skal spælast í Klaksvík leygardagin í komandi viku.

Petur Erhardt Kjærbo úr Sumba verður dómari í Hvalba, og Tummas Pauli Olsen úr Gøtu verður dómari í Klaksvík.

Royn endaði á silvurplássinum í 3. deild. VB fekk gull og flutti beinleiðis upp, og Royn skal nú í tveimum dystum finna út av, um teir fara at megna at endurvinna plássið, sum teir í fjør mistu í 2. deild.

KÍ endaði næstaftast í 2. deild. Í síðsta dystinum, sum varð spældur á Skála síðsta leygardag, taptu teir 6–1. Men dysturin á Skála kastar eisini myrkar skuggar á kvalifikatiónsdystin í Hvalba í morgin. Miðskeiðis í 2. hálvleiki varð álopsmaðurin Erling Fles útvístur, og í síðsta minuttinum sá John Havn reyða kortið.

**jh**

## Morten í fýra ár afturat

**Danski landsliðsvenjarin sigur tað vera ítróttarlig og ikki peningalig viðurskifti, sum eru orsøkin til, at hann hevur longt samstarvið við DBU**

Tað hevur leingi ligið í luftini, og nú er tað komið á skrift. Morten Olsen verður landsliðsvenjari í Danmark til og við 2006.

Góða spælið og fínu úrslitini hjá danska landsliðnum, síðani Morten Olsen fyri fyrstu ferð stóð á odda fyri landsliðnum – tað var 16. august í fjør, tá Danmark vann 2–0 á Føroyum á Tórsvølli – hava havt við sær, at bæði donsku fjølmiðlarnir og fótbóltsáhugaðir danir so at siga hava gjørt tað til eitt fólkakrav, at avhildni venjarin skal halda fram.

Higartil hevur Morten Olsen havt eina ársløn sum danskur landsliðsvenjari uppá 1,75 milliónir krónur. Tað hevur ljóðað, at kravið hjá honum hevur verið, at lønin skuldi tvífaldast. Tað er ikki komið almennt fram, hvussu stór lønin nú verður, men tað er einki at ivast í, at talan er um lønarhækkan.

Kortini verður tað ikki hildið, at talan er um serliga stóra løn. Morten Olsen hevði havt møguleika at gerast venjari hjá onkrum týskum felag, og har eru lønirnar væl hægri, enn tað, sum hevur ljóðað frá danska landsliðnum.

Morten Olsen undirstrikaði sjálvur í fyrradagin, tá hann og aðalskrivarin í DBU, Jim Stjerne Hansen, høvdu undirskrivað sáttmálan, at tað ikki var so nógv pengarnir, men heldur ítróttarligu avbjóðingarnar, sum høvdu verið orsøkin til, at hann var stak áhugaður at halda fram inntil 2006.

Morten Olsen doyr neyvan í hungri við lønini, sum hann nú fer at fáa, men hann kundi altso havt fingið nógv meiri onkra aðra staðni.

– Vit hava eitt gott lið, sum spælir góðan fótbólt og hevur rokkið góðum úrslitum. Tað er ikki víst enn, men vit hava góðar møguleikar at sleppa upp í part í HM endaspælinum í Japan og Suðurkorea. Eftir ta kappingina verður setningurin at spæla okkum í EM endaspælið í Portugal í 2004 og HM endaspælið, sum verður í Týskalandi í 2006. Hetta verður sera spennandi, og eg haldi, at framtíðin hjá landsliðinum sær ljós út. Á liðnum eru nógvir ungir spælarar, og á yngru landsliðunum hava fleiri spælarar víst sera gott hegni, so tað er einki at ivast í, at teir um ikki so langa tíð verða evni til besta landsliðið, segði Morten Olsen í fyrradagin.

**Hjálparvenjarin**

Michael Laudrup hevur verið hjálparvenjari hjá Morten Olsen. Laudrup vil ikki fyrrenn eftir síðsta HM undankappingardystin – hann verður annar leygardag á heimavølli ímóti Íslandi – taka støðu til, um hann er sinnaður at halda fram ella ikki. Í Danmark hevur verið hildið, at samstarvið millum Olsen og Laudrup hevur verið fyrimyndarligt og sera gagnligt fyri danska landsliðið og danskan fótbólt.

Um Laudrup velur ikki at halda fram, so verður mett, at hann skjótt verður venjari hjá onkrum donskum ella útlendskum felagi. Í tí sambandinum hevur Brøndby fleiri ferðir verið nevnt. Venjarin í Brøndby, norðmaðurin Åge Hareide, hevur boðað frá, at hann ikki er sinnaður at halda fram, tá sáttmálaskeiðið hjá honum og Brøndby komandi summar verður liðugt.

**jh**